# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fíggjarmálaráðharrin og tollfría sølan

Vit funnust á hesum stað at undanfarna fíggjarmálaráðharra, Karsten Hansen fyri at vilja avtaka tollfríu sigarettirnar. Nú tekur eftirmaður hansara og lýsur somu kunngerð, uttan at argumentini eru batnað stórvegis.

Spurningurin er ikki um fólkaheilsu, men um borgarans rætt til eitt bagatellmark, tá tað kemur til persónligan innflutning, tað veri seg av sunnum ella ósunnum vørum.

Sigarettir eru heilsuskaðiligar, eingin ivi um tað. Men ger tað sama seg ikki eisini galdandi við brennivíni, borðvíni, góðgæti og stiletthælum?

Góðtaka vit, at ein fíggjarmálaráðharri við einum pennastroki kann avtaka tollfríu kvotuna av sigarettum, tí tær eru heilsuskaðiligar, so siga vit eisini, at hann kann gera tað fyri rúsdrekka, og so fyri góðgæti. Til seinast, so sita føroyingar sum eitt av fáu økjunum í heiminum uttan eina tollfría kvotu til persónligt brúk. Tvs, at tað verður verri at búgva í Føroyum í mun til lond, sum ikki eru so avmarkandi. Aftur eitt tápuligt initiativ í einari tíð, har man tosar um at fáa føroyingar at flyta heimaftur á klettarnar.

Gamaní ber ikki til at keypa og innføra sigarettir og brennivín tollfrítt millum EU lond, men harafturímóti ber til at hava so nógv vín og øl við sær millum EU lond, sum man orkar at bera. Hetta veit føroyska fíggjarmálaráðið av, men sum altíð, tá samanberingar vera drignar, so fær føroyski borgarin bert tær samanberingar at vita, sum seta føroysk avgjøld í gott ljós.

Fyri ferðavinnuna, sum hóast alt hevur nógv hundrað arbeiðspláss í Føroyum, so er kunngerðin eitt bakkast. Gamaní stendur ikki væl til, um sigarettsøla er tað, sum avger lív ella deyða fyri hesa vinnu, men eingin orsøk er at gera tað tyngri, enn tað frammanundan er.

Í hesum døgum, har heimurin er á knøum vegna fíggjarligar brotasjógvar, so er vert at hugsa um, hvussu nógv av hesum almennu íverksetaratiltøkunum, sum eru so nógv uppi í tíðini millum politikarar og embætisfólk, skulu rigga fyri at geva sama tal av arbeiðsplássum, sum t.d. Smyril Line gevur.

Er nøkur ábending um, at hesi tiltøk koma at geva tað? Neyvan.

At føroyingar velja at víkja frá internationalum praksis viðvíkjandi tollfrían flutning millum lond, er avmarknadi fyri føroyingar í mun til aðrar borgarar. Tað má sigast at vera eitt vónbrot, at nýggi fíggjarmálaráðharrin er byrjaður at grava grøvina fyri allari tollfríari sølu til Føroyar. Hetta setur Føroyar í bás við tey mest restriktivu londini í heiminum, tí EU samanberingin sum kunnugt ikki heldur. At undanmaður hansara gjørdi tað, er øðrvísi, tí hann kom úr einum flokki, sum einki álit hevur á einstaklingin, tá tað kemur til lastir og freistingar. Javnaðarflokkurin átti at havt eitt annað grundsjónarmið.

Borgarin hevur uttan veruliga poltiska viðgerð fingið eitt bagatellmark tikið burtur. Hetta er spell. Tað næsta fer at vera rúsdrekka og annað smávegis luksus, sum man gevur borgarum tollfrítt til persónliga nýtslu. Forboðslandið Føroyar er komið eitt stig nærri.

**Sosialurin**

# Arbeiðsportalur við 400 skrásetingum

**Síðani ein privatur arbeiðsportalur fór undir at skráseta persónar, ið bjóða seg fram á føroyska arbeiðsmarknaðinum, eru á leið 400 fólk skrásett. Umframt føroyingar í Føroyum og Danmark er áhugi í Íslandi fyri føroyska arbeiðsportalinum**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*




*Tað var 3. juli í ár, at arbeiðsportalurin, Arbeiði.fo, fór í luftina*

Í løtuni eru 19 størv leys, stendur at lesa á heimasíðuni arbeidi.fo, sum er ein portalur, har fólk kunnu skráseta sítt cv, og har arbeiðsgevarar kunnu lýsa størv leys.

Yvirlitið, sum alla tíðina verður dagført, vísir í skrivandi løtu, at innan almanna og heilsuverkið eru níggju stør, fiskivinnuna á landi tvey, fyrisiting trý, ídnað og handverk eitt, lærpláss ella starvslestur eitt, umframt trý størv innan heitið Ymiskt.

Stigtakararnir til einsta private arbeiðsportalin vísa á, at búskaparliga afturgongdin í føroyska samfelagnum sæst aftur á vitjunartølunum, sum nú hevur 400 skrásettar brúkarar. Eisini íslendingar vísa føroyska arbeiðsportalinum áhuga, verður sagt.

- Hóast eingi almenn tøl enn skjalprógva, at arbeiðsloysið í Føroyum er vaksandi, so bendir kortini nógv á, at tíðin við metlágum arbeiðsloysi er um at halla. Ein tíðilig ábending um hetta sæst aftur í vitjanartølunum hjá føroyska arbeiðsportalinum Arbeidi.fo, sum eru í stórum vøkstri. Hvønn dag brúka á leið hálvtannaðhundrað fólk portalin, og higartil í november mánaði hava 130 nýggir brúkarar skrásett seg og lagt sítt CV á Arbeidi.fo. Hetta er met síðan portalurin fór í luftina 3. juli í ár, verður sagt í tíðindaskrivi frá arbeidi.fo við Hergeiri Vang á odda.

Víðari verður sag,t at størsti parturin av teimum, ið brúka nýggja arbeiðsportalin, eru búsitandi í Føroyum, men umleið ein fimtingur av skrásettu brúkarunum eru búsitandi í Danmark. Seinastu tveir mánaðirnar hava eisini nógvir íslendingar skrásett seg á Arbeidi.fo. Einki krav er um at brúkarar skulu hava føroyskt P-tal fyri at skráseta seg á Arbeidi.fo, og sostatt hava útlendingar javnbjóðis møguleika at bjóða seg framfyri føroyskum arbeiðsgevarum umvegis sokallaða CV grunnin á Arbeidi.fo

Tey, ið leita sær eftir starvsmøguleikum á Arbeidi.fo eru javnt býtt um alt landið, og býtið millum kynini er eisni rættiliga javnt. 56 prosent av brúkarunum eru menn og 44 prosent eru kvinnur.

Tey 274 størvini, sum higartil hava verið lýst á Arbeidi.fo, eru hinvegin rættiliga ójavnt býtt. Heili 211 av størvunum vóru í høvuðsstaðarøkinum. Til samanberingar hava bert 11 størv í Suðuroynni og sjey størv í Norðoyggjum verið lýst leys á Arbeidi.fo síðan í summar.

## FAKTA

Arbeidi.fo er ætlað sum millumlið millum arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar. Umframt at leggja sítt CV á portalin og harvið lata møguligar arbeiðsgevarar finna seg, kunnu brúkarar eisini tekna seg til at fáa teldupost um leys størv innan ávísar greinar. Tað er Sp/f Internettænastur, ið stendur aftanfyri Arbeidi.fo, og sum verður rikið óheft av arbeiðsgevarafelagsog arbeiðstakarafelagsáhugamálum

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.